## B36 kann ikki kæra

Reglugerðirnar hjá FSF staðfesta, at avgerðin hjá Kappingarnevndini um Christian Restorff Mouritsen er endalig. B36 noyðist eftir øllum at døma at staðfesta, at tað ber ikki til hjá teimum at knýta Christian Restorff Mouritsen afturat hópinum hetta kappingarárið. Grein 5 í reglugerðini fyri Aganevndina staðfestir nevnliga, at avgerðir um útskrivan og gildi av spæliloyvum eru endalig, tá Kappingarnevndin hevur tikið støðu til hesi. Tó kann Kappingarnevndin av sínum eintingum biða Aganevndina taka støðu til mál.



## Milan keypt Huntelaar

Í gjárkvøldið søgdu bæði spanskir og italskir fjølmiðlar, at áleyparin hjá Real Madrid, Klaas Jan Huntelaar, var ávegis til AC Milan. Í dag váttar italska stórfelagið, at tey hava keypt hollendingin leysan úr spanska stórfelagnum. Huntelaar kemur til Milano í kvøld, har hann skal kannast av læknunum hjá AC Milan, og síðani verður sáttmálin undirskrivaður, skrivar bold.dk, sum eisini vil vera við, at prísurin er 112 milliónir krónur.

# Føroyar tvey pláss fram

**Ikki síðani juli í 2006 hava Føroyar ligið so langt uppi á altjóða styrkislistanum hjá FIFA**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Nummar 163. Tað er føroyska fótbóltslandsliðið á nýggjasta styrkislistanum, sum FIFA kunngjørdi í gjár. Hetta er tvey pláss betri enn á seinasta lista, sum varð kunngjørdur í juli.

Síðani oktober í fjør, tá liðið botnaði og lá nummar 198, hevur so at siga bara gingið støðugt fram á hjá føroyskum fótbólti, um styrkislistin hjá FIFA verður brúktur sum mátistokkur.

Í desember í fjør lá liðið 184 og mánaðin eftir í 2009 var landsliðið farið eitt pláss aftur, so liðið lá nummar 185. Á hesum plássi lá liðið til og við marsmánað, men síðani hevur føroyska landsliðið tikið seg fram, so liðið nú liggur nummar 163.

### Byrjaði í oktober

Positiva gongdin byrjaði, tá Jógvan Martin Olsen í oktober í fjør syrgdi fyri, at føroyska landsliðið fekk javnleik í móti Eysturríki. Síðani hevur liðið vunnið venjingardyst ímóti Íslandi, og hetta sendi liðið upp eftir listanum.

Liðini, ið nú liggja beint framman fyri okkum, eru lond sum Salomon oyggjarnar, Mauritania og Kyrgystan.

### Langt fram til 1999

Hóast góðu gongdina er framvegis langt til toppin – ella so langt fram, sum føroyska landsliðið nakrantíð hevur verið. Tað var í 1999, tá føroyska fótbóltslandsliðið lá nummar 104 á listanum.

Her skal tó takast tað fyrivarni, at útrokningarhátturin, ið tá varð brúktur, ikki er tann sami í dag sum tá.



**Sigurin á Íslandi sendi Føroyar upp eftir styrkislistanum hjá FIFA**
**Mynd: Álvur Haraldsen**

# Hoyvíkingur út á Argir



**Hoyvíkingur, sum varð mannaður á ólavsøku, skiftir ikki navn, men fær drekastevni og skiftir lit**
**Mynd: Álvur Haraldsen**

**Argja Róðrarfelag hevur nú yvirtikið Hoyvíking, soleiðis at felagið fyri fyrstu ferð nakran tíð tekur lut í 10-mannafarsróðrinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Kappróðrarsøga varð skrivað á Argjum í gjárkvøldi. Argja Róðrarfelag hevur nevnliga gjørt avtalu um at yvirtaka ábyrgdina av Hoyvíkingi, sum varð bygdur í 2005, men sum bert veruliga tók lut í FM-kappingini hetta sama árið.

Kristian Martin Skála, næstformaður í Argja Róðrarfelag, váttaði fyri Portalinum í gjár, at avtalan um at yvirtaka bátin er undirskrivað.

- Hetta er ikki keyp ella leiga, men við avtaluni yvirtekur Argja Róðrarfelag bátin.

- Navnið á bátinum verður tó framvegis Hoyvíkingur, men hann verður sproytaður reyður við bláari rond, og sjálvandi fær hann eisini drekastevni, sigur Kristian Martin Skála.

Hetta róðrarárið var Argjabáturin í serflokki besta áttamannafarið í landinum, men Kristian Martin vil tó á ongan hátt longu nú gera av, at tað fyrst og fremst verður tann manningin, sum mannar Hoyvíking komandi róðrarár.

- Tað taka vit til ta tíð. Málið verður í øllum førum, at vit hava eina sterka manning, sum kann kappast frammi í oddinum, sigur hann.